**Álit**

**í**

**ungdómstingsmáli nr. 8/2010: Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í revsilógini (seta revsialdurin niður)**

Málið er lagt fram tann 8. februar 2010, og eftir 1. viðgerð tann 8. februar 2010 er tað beint í Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. februar 2010.

Undir viðgerðini er nevndin komin fram til, at um revsialdurin verður settur niður til 14 ár, so kann aldursmarkið eins væl setast niður til 13 ár. Nevndin heldur ikki, at tað loysir seg at sperra fólk inni sum 13 ella 14 ára gomul. Hetta kann bert gera tingini verri og trupulleikarnar størri. Ofta eru tey ikki greið yvir, hvat er skeivt, og hvørjar fylgir tað kann hava við sær, tá tey bróta lógina. Nevndin er heldur av tí áskoðan, at størri vinningur er í, um man royndi at geva betri ráðgeving og vegleiðing um, hvat er rætt ella skeivt og byrgja fyri vandanum av bólkatrýsti. Í staðin fyri at blíva revsaður, so skal man kunna geva persóninum ta hjálp, ið tørvur er á, fyri at sleppa undan slíkum broti aftur. Hetta kann m.a. gerast umvegis eitt tættari og størri samstarv við sálarfrøðing, barnavernd, stuðulsbólkar og aðra góða fyribyrgjandi hjálp.

Ein samd nevnd tekur við hesum viðmerkingum ikki undir við málinum og mælir Ungdómstinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 9. februar 2010**

Birita Poulsen, formaður

Anfinn Kallsberg

Hergeir W. Lognberg

Sára Petersen

Kristian Martin Juul

Fríðunn Jacobsen

Katrin Dahl Hanusson

Sudarat Niyomtham

Sólrun Henrysdóttir

Henrik Joensen